

– Tað skapar eitt sterkari samband við áhoyraran, um tú kanst fara út at spæla fyri fólki, og tí skal eg í grundini spæla so nógv sum gjørligt komandi tíðina, sigur Brandur Enni.

MYND: JANA DAMRØSE

# Brandur bjóðar norðurlondum av

– TAÐ RÆÐUR UM AT KOMA ÚT AT SPÆLA FYRI SO NÓGVUM FÓLKI SUM GJØRLIGT, SIGUR **BRANDUR ENNI**, SUM VIÐ NYGGJARI FLØGU OG NÓGVUM LIVE-FRAMFØRSLUM SKAL ROYNA AT VINNA FRAM Í **NORÐURLONDUM** KOMANDI MÁNAÐIRNAR



TÓNLEIKUR

Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Tað er nógv vant runnið í ánni, síðani Brandur Enni sum evnaríkur tannáringur legði Føroyar og Ísland fyri sínar føtur. Nú er poppsangarin av Tvøroyri blivin vaksin, skrivar sínar egnu sangir og gevur sína fyrstu fløgu við egnum sangum út.

Men tað hevur ikki verið lætt at taka stigið sum sangskrivari.

– Tá ið eg gav tónleik út í Føroyum, skrivaðu bestu sangskrivarar í Føroyum sangir til mín, og tí var tað ikki lætt hjá mær at fara at skriva sangir til mín sjálvan, sigur Brandur Enni.

Men hann er komin framvið ringasta óttanum, tí hann hevur skrivað eina rúgvu av sangum, og ein av sangunum er í ár í uppskoti til besta sang á Planet Awards. Tað er sangurin *Sometimes Truth Needs A Lie*, sum er heitissangurin á nýggju útgávuni hjá Brandi.

## Út at spæla

Fløgan hjá Brandi Enni er komin út í Føroyum, og seinni í januar skal fløgan gevast út í Norðurlondum. Síðani skal Brandur út at spæla fyri at stuðla útgávuni og sínum egna frambroti.

– Tað skapar eitt sterkari samband við áhoyraran, um tú kanst fara út at spæla fyri fólki, og tí skal eg í grundini spæla so nógv sum gjørligt komandi tíðina, sigur Brandur Enni.

Framførslurnar til konsertir og sonevnd showcases verða serliga í Svøríki, men eisini í hinum norðurlondunum.

– Ein góður møguleiki er ofta at sleppa at hita upp fyri onkrar kendan tónleikara, tí tá koma nógv fólk á konsert, og vit arbeiða við, at eg kann fáa slíkar uppgávur, sigur Brandur Enni.

Hann hitaði upp fyri Alexander Rybak – norska Grand Prix vinnaran – herfyri, og tað gav nógva góða umtalu, og í næstum skal Brandur spæla saman við eit tnú kenda svenska tónleikaranum Thomas Ledin.

– Samstundis sum hendan fløgan kemur út í norðurlondum, fara vit at arbeiða við einari nýggjari útgávu, sum skal gevast út uttanfyri norðurlond, sigur Brandur Enni.

Áðrenn leiðin verður løgd av landinum, kunnu føroyingar uppliva Brandur Enni á konsertum í Føroyum. Hann hevur útgávukonsertir í Fuglafirði, Tvøroyri og í Havn næstu tíðina.

## INNIHALD

4 SAMRØÐA: DÓLGARNIR
BJØRN, BERINT OG BJARTI SAMAN AFTUR
8 TIPS: JÓLAGÁVURNAR Í EVSTU LØTU
10 90 SEKUND: JÓLAMAÐURIN SVARAR
12 10 TING UM: LIONEL MESSI
14 MATUR: JÓLABORÐ Á HÚSARHALDSSKÚLANUM
16 SAMRØÐA: GUTTORM DJURHUUS
18 SAMRØÐA: BISPUR UM JÓL OG MENNISKJU
22 FERÐAFRÁSØGN: Á FÍLABEINSSTRONDINI
26 TIL ARBEIÐIS: ANN-BRITT JOHANNESEN
30 REPORTASJA: HEIMA HJÁ LASSA SØRENSEN
34 REPORTASJA: SJÓNLEIKARI OG LEIKSTJÓRI ÚR MIÐVÁGI
36 HUGLEIÐINGAR: INGI MOHR OG PRELIMINERSKÚLIN
40 JÓLASØGA: NÁLIN
46 MÍN BESTA UPPSKRIFT: JÓLA-DOUGHNUTS
48 KLUMMA: ÁSA UNDIR KLETTI
50 TAÐ HENDUR: KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR osfr.
52 VIKUMYNDIN: BESTA MYNDIN Í VIKUNI

# Gleðilig edrú jól!

KLUMMA

Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

Jólini eru barnanna hátíð. Hetta er ramsa, ið verður endurtikin allan jólamánaðin. Børnini skulu verða glað. Tey skulu fáa pakkar, klem frá jólamanninum, fín klæði og nógv gott at eta.

Flestu børn fáa alt hetta á jólum. Vit eru heppin at búgva í einum landi, har foreldrini hava ráð at halda eini gleðilig jól fyri sær sjálvum og børnunum.

Saman við øllum glitrinum er ein snapsur innanfyri vestin eisini ein sjálvfylgja á jólum. Hýrurin á foreldrum, ommum og abbum gerst betri, jú longri jólakvøld líður, og børnini ansa sær sjálvum við nýggju leikunum, tey hava fingið.

Eg hevði ynskt at snapsurin var goymdur og gloymdur, til í hvussu so er annað jólakvøld.

Jól eru barnanna hátíð, eisini tá jólapakkarnir eru útpakkaðir og dunnan uppetin. Tey hava rætt til eini friðarlig jól uttan fullamannsskeldarí, grát yvir sorgir, ið koma til sjóndar, tá snapsurin hevur bloytt okkara yvir ego til ein mjúkan svamp

Børn vilja hava muss og klem 365 dagar um árið, og ikki frá einum alkoholangandi munni jólaaftan.

Jólaaftan og jóladagur eru tveir dagar av 365. Lat snapsin og ølina standa hesar dagarnar, so at børnini kenna, at tær kenslur, ið koma til sjóndar, eru veruligar. Vilja mamma og pápi skeldast, jamen, so lat tey skeldast, bara tey gera tað við sínum yvir ego til staðar. Vil gráturin koma yvir onkran, sum ikki er við hesi jólini, lat hann so koma. Bara kenslurnar eru veruligar kenslur.

Tit kanska halda, at børnini ikki merkja, at tit drekka. Tað er galið. Tey merkja tað sera væl, og tey vita hvat, sum er veruligt og óveruligt, og hvat snapsurin ger við mammu og pápa og onnur vaksin rundan um tey.

Lat tíni børn minnast eini góð og gleðilig jól, har mamma og pápi vóru til staðar, bæði kropsliga og sálarliga.

Gleðilig jól!



VIKUSKIFTI Redaktørar: Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
Útgevari: Sosialurin, www.sosialurin.fo
Umbróting: Sosialurin · Høvuðssniðgevi: Pætur Jensen
Forsíðumynd: Dólgarnir / Jens Kristian Vang